


Á teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir dugnaligum fólki til at arbeiða við digitalari kortgerð í sambandi við skráseting av leiðingum v.m. at byrja skjótast til ber.

**Starvið**

Starvið fevnir um uppsetan og supportering av telduskipanini hjá kommununi, herundir eisini skráseting av m.a kloakk- , vatn- og gøtuljósleiðingum.

**Førleikakrøv**

Kommunan sóknast eftir umsøkjara, ið hevur útbugving sum byggifrøðingur, telduatstøðingur ella umsøkjara, ið hevur samsvarandi útbúgving ella royndir innan digitala kortgerð, er fyrikomandi og nærlagdur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Alt skrásetingararbeiðið hjá kommununi verður gjørt við Microstation og er tað umráðandi at tú hevur kunnleika til hesi forrit og annars dugir at samskifta á føroyskum máli. Harumframt er tað ein fyrimunur, at tú hevur kunnleika til forritini í Microsoft Office pakkanum.

**Persónligir eginleikar**

Dentur verður lagdur á, at tú kanst:
- arbeiða sjálvstøðugt
- er fyrikomandi og nærlagdur
- arbeiða í góðum samstarvi við starvsfelagar og onnur sum arbeiða hjá kommununi.

**Setunarviðurskifti**

Starvið verður sett skjótast til ber og lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**

um starvið við at venda sær Boða Haraldson, býarverkfrøðing ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

**Umsókn**

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum tilmælum skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 26. oktober 2007. Merkið umsóknina „Starvsfólk til FDS á Teknisku deild“

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

## Setursskrivari

Fyrisitingin á Fróðskaparsetrinum sóknast eftir setursskrivara í eitt tíðaravmarkað starv at seta frá 1. desember ella skjótast til ber til 30. november 2008.

Setursskrivarin hevur í samstarvi við rektaran leiðsluna av fyrisiting og skrivstovu setursins. Arbeiðið fevnir m.a. um fíggjarmál, starvsfólkamál, hølisviðurskifti, menning og rakstur av fyrisitingarligum KT-skipanum, setursráðsfundir, samskifti við deildirnar og við miðfyrisitingina, samstarv við stovnar í Føroyum og í grannalondunum. Setursskrivarin hevur 4 starvsfólk á skrivstovu síni.

Landsstýrismaðurin arbeiðir í løtuni við lóg um at leggja saman Sjúkraróktarfrøðiskúla Føroya, Føroya Læraraskúla og Fróðskaparsetur Føroya til ein stovn. Setursskrivarin kemur at hava ein týðandi leiklut í samskipanini av hesi áhugaverdu samanlegging.

Vit ímynda okkum, at tú hevur relevanta akademiska útbúgving, og royndir við leiðslu og fíggjarstýring. Tað er ein stórur fyrimunur, um tú hevur hollan kunnleika til ymsar KT skipanir, eins og tað er ein fyrimunur, um tú hugsar kreativt og nýskapandi.

Starvið er skipað sum deildarleiðarastarv. Løn og setanartreytir eru sambært avtalu millum Lønardeildina og avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið og arbeiðsplássið frá Anniku Sølvará á tel. 552504 ella á ***annikas@setur.fo***

Umsókn við viðkomandi skjølum, ið skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 26. oktober, skulu sendast til:

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · FO-100 Tórshavn
***ella til annikas@setur.fo***

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

TEAM85

# Sølustevna

1. desember 2007
í Glæmuni í Kvívík

**Um onkur ynskir at sýna fram og selja**
**»HANDALIGT ARBEIÐI«**

**Tað kann verða:**

troyggjur, hosur, vøttur, ullvøra, tøvt, bundið og seyma.

**Prýðislutir**

úr horni, træ, gandadeiggj, perlum og pappír...

**eru tit vælkomin at seta tykkum í samband** við tlf. 211600

**Bygdarfelagið Glæman**